gult cyan magenta svart

Karsten Hansen vi› at geva skarvin yvir í ósemjuni Brimil

– Møguleikarnir fyri at finna semju eru nú av álvara vi› at vera troyttir. Men ein endi má finnast á ósemjuni, so nú nærkast tí›in skjótt, har máli› ver›ur lagt fyri Løgtingi›, sigur landsst‡risma›urin í fíggjarmálum

ÓSEMJAN UM BRIMIL
Áki Bertholdsen

– Nú skal ikki nógv til afturat, á›renn ósemjan um lønina hjá teimum, sum skulu sigla vi› n‡ggja vaktarskipinum Brimli, ver›ur løgd fyri Løgtingi› at taka stø›u til.

Eftir at seinasta semingsroyndin miseydna›ist t‡sdagin, ásannar Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, at møguleikarnir fyri at finna semju eru av álvara vi› at vera troyttir. Hann sigur, at enn er tó einki avgjørt um at leggja máli› fyri tingi›. Máli› skal umrø›ast á landsst‡risfundi ein av fyrstu døgunum, og eftir ta› ver›ur stø›a tikin til, hvussu farast skal fram hi›ani frá.

Á seinastu semingsroyndini t‡sdagin, leg›i fíggjarmálast‡ri› eitt uppskot fyri manningafeløgini, sum tey vraka›u.

Men Karsten Hansen heldur kortini ikki, at afturvísingin hjá manningarfeløgunum var púra avgjørd og treytaleys og tí kann ta› kortini vera, at okkurt vísir seg, tá i› svari› er kanna› gjølligari.

Hann heldur, at vit skulu aldrin siga aldrin. Men ta› skilst kortini á honum, at innast inni tr‡r hann sjálvur ikki serliga nógv uppá tann møguleikan longur.

Í veruleikanum hevur talan onganti› veri› um samrá›ingar. Krøvini frá manningafeløgunum hava veri› treytaleys og tey hava ikki vilja› flutt seg ein tumma.

– Hinvegin hevur fíggjarmálast‡ri› flutt seg rættiliga langt. Tí hevur stø›an veri› heilt, heilt óvanlig og undir slíkum umstø›um ber næstan ikki til at semjast, sigur Karsten Hansen. Hann sigur, at á fyrsta samrá›ingarfundinum løgdu manningafeløgini síni krøv fram, og sí›ani settu tey seg upp afturá og hava heilt einfalt ikki vilja samrá›st.

– Men eg havi bo›a› greitt frá, at stendur ta› til mín, ver›a lønarkrøv uppá upp á yvir 40% ikki gingin á møti í einum høggi – og so slett ikki mitt í einum sáttmálaskei›i.



–Halda Skipara- og Navigatørfelagi› og Maskinmeistarafelagi›, at ta› ber til at seta treytaleys krøv fram og so seta seg í djúpa stól at bí›a, til tey eru gingin á møti, fara tey skeiv, sigur Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum

Karsten Hansen sigur, at ta› hev›i veri› ta› besta, um hendan ósemjan kundi ver›i› loyst vi› samrá›ingum.

– Men tá i› annar parturin hevur víst, at hann yvirhøvur ikki vil samrá›ast, mugu vit ásanna, at tí›in nú er nú vi› at nærkast, har Løgtingi› ver›ur noytt til at avgrei›a spurningin. Tí máli› skal so loysast og nú er ta› nógv sum bendir á, at ta› ikki ber til at finna eina samrá›ingarloysn.

Karsten Hansen sigur, at hann vir›ir samrá›ingarrættin hjá hjá arbei›smarkna›inum.

– Men tá i› feløgini, sum tvíhalda um hendan samrá›ingarrættin, ikki vilja samrá›ast, hava vit ein trupulleika.

Stúrir ikki

Fakfeløgini hava lova› ilt, um máli› ver›ur lagt fyri tingi›. Stúrir tú ikki fyri avlei›ingunum, um máli› ver›ur lagt fyri tingi›?

–Nei, ta› geri eg ikki. Fakfeløgini fara skeiv, um tey halda, at tey kunnu seta órímilig krøv og so seta seg í djúpa stól at bí›a, til vit hava gingi› krøvunum á møti.

– Ver›ur máli› lagt fyri tingi›, ver›ur ta› tingi›, sum leggur stø›i›.

– kann ikki anna› enn leggja eitt uppskot fyri tingi›. Men ta› ver›ur eitt uppskot, sum sum er búskaparliga forsvarligt og ikki eitt uppskot, sum gongur feløgunum á møti.

– Og so stendur ta› til tingi› at gera av, hvussu stór lønarhækkingin skal vera. Heldur tingi›, at ta› er hóskandi vi› eini lønarhækking uppá 3%, ver›ur ta› so. Heldur tingi› hinvegin, at ein lønarhækking uppá 40% er rímilig, ver›ur ta› so.

– Men tingi› skal bara gera sær greitt, at vi› teirri avger›, sum ta› tekur, fer ta› at leggja stø›i› fyri teimum sáttmálasamrá›ingum, sum ver›a í vár. Og metir tingi›, at ein lønargli›ing á hasum stø›inum, so er bara at samtykkja eina munandi lønarhækking.

Og Karsten Hansen leggur afturat, at avger›in, sum tingi› fer at taka, um ta› kemur hartil vi› Brimli, fer at geva honum sjálvum eina grei›a ábending um, hvør linja skal leggjast í lønarsamrá›ingunum, sum vera í vár.

Vísti kæruni frá sær

Bygdará›i› í Sumbiar Kommunu gav ikki Finnbjørn Poulsen vi›hald í kæruni um kommunuvali› 21. november

KOMMUNUVALI‹
Áki Bertholdsen

Ta› fór onki óreglugligt fram á bygdará›svalinum í Sumbiar Kommunu næstseinasta t‡sdag.

Ta› sta›festi bygdará›i› á fundi t‡skvøldi›.

Sostatt vildi ta› ikki geva Finnbjørn Pouslen vi›hald í kæruni, sum hann hev›i sent bygdará›num um mátan, sum vali› var› avgreitt uppá.

Finnbjørn Poulsen var uppstilla›ur til bygdará›svali›, men var› ikki valdur. Sjálvur heldur hann, at eitt mistak var› gjørt, sum førdi til, at hann misti møguleikan at standa seg á jøvnum føti vi› hini valevnini.

Hann hevur bú› ni›ri, men flutti heim á sumri í 1999, og skuldi búgva í Lopra, sum er í Sumbiar Kommunu.
Men nú valhølini lata upp, varnast fólk, at hann stendur ikki á vallistanum.

Aftaná kemur ta› út, at hann er ikki valbærur í Sumbiar Kommunu, tí av misgáum hevur Landsfólkaeftirliti› í Havn skrásett hann í Vágs Kommunu.

Hann sigur, at fólk, sum fóru á val, fingu tí at vita, at tey kundu ikki velja hann, tí hann var› ikki skrásettur í Kommununi.
Sum dagurin lí›ur, ver›ur mistaki› rætta og tey, sum komu á val eftir døgver›a, fingu onki at vita um, at tey ikki kundu velja hann
– Sostatt var› eg strika›ur á atkvø›use›linum í helvtini av tí›ini, sum valhølini vóru opin og tí havi eg ikki havt sama møguleika, sum hini valevnini, sigur hann

Onki óregluligt

Bygdará›i› vi›gjørdi kæruna t‡skvøldi› og ni›urstø›an var, at Finnbjørn Poulsen skuldi ikki fáa vi›hald í kæruni.

Jacob Vestergaard, bygdará›sforma›ur, sigur, at hetta vóru teir f‡ra bygdará›slimirnir, sum vóru á fundi, samdir um. Fimti bygdará›slimurin var burturstaddur.

Bygdará›sforma›urin sigur, at á›renn bygdará›i› tók avger›, fekk hon eina frágrei›ing frá valst‡rinum. Hann vil ikki út í æsir vi› málinum, tí enn er møguleiki at kæra avger›ina fyri Landsst‡rinum, so enn er kæran ikki endaliga avgjørd.

Men í stuttum sigur hann, at Finnbjørn Poulsen flytir heim á sumri 1999 og búsettist í Sumbiar Kommunu. Kommunan fær bræv um flytingina og skrásetir hana.

Sí›ani ver›a flytipappírini send Landsfólkayvirlitinum at ver›a skrásett har. Og tá er ta›, at mistaki› hendir og at Landsfólkayvirliti› skrásetir hann í Vági.

Jacob Vestergaard heldur, at orsøkin til mistaki› er, at Sumbiar Kommuna hevur eisini postsmogu í Vági.

Men ta› stendur greitt í pappírunum, at hann er fluttur til Sumbiar Kommunu.

Av tí, at hann er skrásettur í Vági, kemur hann ikki á vallista í Sumba. Men ta› er hvør einstakur, sum hevur ábyrgdina av kanna, um hann stendur á vallistanum.

– Ta› stó› Finnbjørn Poulsen ikki. Ni›urstø›an var tí, at hann var í Sumbiar Kommunu og hev›i tískil eisini valbæri. Hann var tí ikki strika›ur av atkvø›use›linum. men av tí, at hann ikki stó› á vallistanum, slapp hann sjálvur ikki at velja, sigur bygdará›sforma›urin.

Føroysk metbók á markna›in

Fyrst í hesum árinum fór sørvingurin Sonni Jacobsen undir at skriva eina føroyska metbók. Hon ver›ur í løtuni innbundin og væntandi í sølubú›unum ein av fyrstu døgunum

METBÓK
Stefan í Skorini

Føroya longsti speril, Føroya fyrsta slupp, Føroya største myndasavn, Føroya største savn av ymiskum øli. Hetta er nøkur av teimum metunum, sum lesast kann um í n‡ggju bókini.



Sonni Jacobsen kundi fyri ta› skriva eina bók um seg sjálvan. Hann er nevniliga fyrsti føroyingur at skriva eina metbók á føroyskum. Hann hevur neyvan tiki› sítt met vi› í bókina, men hann l‡kur annars krøvini, sum skulu til.

Bóru skjótt at

– Hugskoti› fekk eg frá Sjúr›i Poulsen, sum vendi sær til mín sí›sta vetur, og hann hev›i sett í seg at fáa eina føroyska metbók givna út. Eg helt, at ta› var spennandi, og í fyrst í hesum árinum fór eg undir at skriva, sigur Sonni Jacobsen.

Sonni arbeiddi burturav vi› metbókini tveir teir fyrstu mána›irnar í ár, men sí›ani hevur hann skriva› ni›ur føroysk met til bókina av og á.

– Eg arbeiddi burturav vi› metbókini í tveir mána›ir fyri at fáa gongd á arbei›i›, og ta› hevur bara eydnast væl, heldur Sonni.

Teir hava bori› skjótt at vi› at fáa hugskoti› framt í verki. Eitt gott ár aftaná, at ta› fyrstu fer› tiki› upp, er bókin á markna›inum.

300 sløg av øli

Sonni sigur, at bókin er naka› seinka›, men at hon nú er til innbindingar. Tskil skulu vit ikki bí›a leingi afturat, á›renn til ber at lesa um alskyns føroysk met.

Metini í bókini eru sera ymisk og spenna ví›a. Har er alt frá fiskivinnu og søgu til ítrótt, og søvnini av ymiskum tingum í Føroyum eru eisini fleiri.

Metbókin telur 200 sí›ur og hevur upp ímóti 150 myndir. Eitt ta› áhugaverdasta meti› heldur Sonni vera eitt savn av eini 300 ymiskum sløgum av øli. Onnur met eru eitt myndasavn vi› 15.000 myndum, sum ein kvinna hevur savna›, og Føroya longsti speril er eisini funnin.

Sonni heldur ikki, at ta› hevur veri› torført at fáa fatur á metum. Fleiri hava ringt til teirra vi› metum, og teir hava eisini sett seg í samband vi› ítróttarsambond og onnur fyri at fáa met, og tey flestu hava veri› hjálpsom.

Ikki hvørt ár

Sonni heldur ikki, at ein slík metbók ver›ur givin út á hvørjum ári, tí nóg miki› av tilfari er ikki til tess í Føroyum.

– Um havt ver›ur í huga, at vit bara hava arbeitt vi› bókin í eitt ár, so eri eg hampuliga væl nøgdur, men man er onganti› heilt nøgdur, tí ta› er altí› okkurt, sum kann gerast betur, sigur Sonni.

Sonni hevur fyrr lati› bøkur úr hondum. Hann hevur m.a. skriva› bókina “Sørvágur og sørvingar”.

Ma›urin aftanfyri metbókina, Sonni Jacobsen, hevur sett met vi› at geva ta fyrstu føroysku metbókina út

Nevndin fyri Vágatunnilin á kunningarfer›

Nevndin fyri P/F Vágatunnilin var herfyri í Noregi og Danmark fyri at hyggja at undirsjóvartunlum og fáa naka› meira at vita um innkrevjingarskipanir

VÁGATUNNILIN
Stefan í Skorini

– Ta› er gott at kunna læra av royndunum hjá ø›rum, sum eisini fáast vi› at gera undirsjóvartunlar, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum.

Nevndin hugdi nærri at tunlum í bæ›i Danmark og Noregi. Hetta var fyri at fáa vitan um undirsjóvartunlar sum heild.

Nevndin hugdi eisini nærri at innkrevjingarskipanum, sum n‡ttar ver›a a›rasta›ni. Ta› kunnu ver›a automatiskar ella manuellar skipanir.

– Ta› er ógvuliga ymiskt, hvussu hesar innkrevjingarskipanir virka, og hvørjar ver›a n‡ttar. Vit hava enn ikki tiki› stø›u til, hvussu vit skulu seta hetta í verk hjá okkum í Føroyum, sigur Dávur Reinert Hansen.

– Vit skulu fyrst gera eina meting av, hvørja inntøku vit kunnu vænta at fáa burturúr n‡tslugjaldi, sigur Dávur Reinert Hansen.

Annars gongur ta› væl vi› sjálvum arbei›num at gera undirsjóvartunnilin. 500 metrar hava teir bora› higartil, og tí›arætlanin heldur.

Stak stór rót

Onkur er heppin ella hevur serligt hegni at fáa gó›an ávøkst av tí, sum sett ver›ur í jør›ina. Rótin á myndini vá 4,5 kilo, tá hon var› tikin uppaftur

RØTUR
Stefan í Skorini

Talan er um rót av slagnum Colorabi, sum Kjartan Petersen á Sandi hevur havt í rótaveltuni. Eitt anna› vanligt slag eru maj-røtur, sum ver›a tiknar upp fyrr á árinum.

Kjartan letur annars sera væl at ávøkstinum í ár sum heild. Hann hevur nevniliga havt anna› enn røtur. Radisurnar eydna›ust eisini væl, me›an gularøt-urnar og eplini vóru á gó›ari lei›.

Onkuntí› riggar ta› bara. Henda rótin vá 4,5 kilo, tá hon var› tikin uppaftur úr eini veltu á Sandi. Ta› er abbadóttir Kjartan, sum heldur rótini á myndini

Mynd: Jens Kr. Vang

Tann yvirvaksna rótin hevur veri› í veltuni hjá Kjartani á Fossam‡ri á Sandi.

Ta› hev›i kanska veri› eitt gott hugskot at fingi› sær ein jar›arteig á Fossam‡ri. Ta› kundi hent, at røturnar høvdu veri› eins stórar og tær hjá Kjartani.